## Fara at skjóta seismikk aftur

**Komandi mánað verður aftur farið í holt við at gera seismiskar kanningar í Leirvíksfirði. Eftir ætlan skulu forkanningarnar verða lidnar í ár**

TUNNIL
*Heri á Rógvi*

Fyrstu royndirnar við at fyrireika ein møguligan undirsjóvartunnil í Leirvíkfirði gingu ikki heilt eftir ætlan. Lítið og einki spurdist burturúr teimum fyrstu kanningunum. Landsverkfrøðingurin gevst tó ikki so, og gongur sum ætlað, verða nýggjar kanningar gjørdar í oktober.

Hesa kannningarnar verður tað tó ikki tað sama felagið, sum kemur at standa fyri. Norska fyritøkan Geomap skal gera hesar kanningarnar, og er henda fyritøkan kend í Føroyum. Tað var eisini Geomap, ið stóð fyri at gera seismisku kanningarnar í sambandi við tunnilin um Vestmannasund. Tað upprunaliga ætlanin, at Geomap skuldi standa fyri teimum kanningum, sum vórðu gjørdar í summar, men orsaka av nógvum arbeiði gjørdist tað ikki møguligt hjá teimum at gera kanningarnar í summar.

Landsverkfrøðingurin upplýsir, at kanningararbeiðið eftir ætlan skal byrja 21. ella 22. oktober. Arbeiðið fer væntandi at taka tað mesta av einum mánað.

Sambært upprunaligu ætlanini, so skuldi forkanningarnar verið lidnar í ár. Landsverkfrøðingurin vónar og væntar eisini, at henda tíðarætlan verður hildin.

Í løtuni verða ymsar boriroyndir gjørdar, og hetta arbeiðið gongur sum tað skal.

Eftir at forkanningarnar eru lidnar, kann verða farið í holt við at planera undirsjóvartunnilin. Tað verða tó politikararnir, ið fara at avgera endaligu lagnuna hjá undirsjóvartunnilinum í Leirvíksfirði.

# Óhapp á Frælsinum

FERÐSLUÓHAPP
*Heri á Rógvi*



*Myndatekstur: Neyðugt var at boðsenda sløkkiliðnum fyri at fáa motorsúkkluna leysa.*

*Mynd: Jens K. Vang*

Førarin á einum bili, sum ætlaði sær at steðga á einari Shell støð, mátti ásanna, at tað kanska ikki er heilt vandaleyst. Bilurin varð árendur av einari motorsúkklu. Førarin á motorsúkkluni ansaði eftir øllum at døma ikki nóg væl eftir, at bilurin frammanfyri setti ferðina niður.

Tað var seinnapartin týsdagin, at tað hendi eitt ferðsluóhapp á Frælsinum í Havn. Tað var klokkan 15.31, at løgreglan í Havn fekk fráboðan um eitt ferðsluóhapp á Frælsinum.

Óhappið hendi, tá ein bilur skuldi sneiða inn á Shell støðina á Frælsinum. Bilurin setti ferðina niður og beint tá hann skuldi sneiða inn, so varð hann árendur av einari motorsúkklu, sum koyrdi aftanfyri bilin.

Motorsúkklan gjørdist føst undir bilinum. Hetta gjørdi, at tað var neyðugt at boðsenda sløkkiliðnum at fáa súkkluna leysa.

Av politistøðini í Havn verður upplýst, at orsøkin til óhappið helst eigur at vera ósketni frá føraranum av motorsúkkluni. Bæði akførini fingu smávegis skaðar, men eingin persónsskaði var, verður upplýst av politistøðini.

# Nýggjar myntir

**Mikudagin gav danski tjóðbankin út nýggjar 10- og 20-krónamyntir. Nýggju myntirnar eru prýddar við einari nýggjari andlitsmynd av drótningini**

PENGAR
*Heri á Rógvi*




*Nýggjar andlitsmyndir av drótningini eru at síggja á nýggju myntunum. Andlitsmyndirnar á myndini eru teir fyrstu síðani nýggja røðin byrjaði í 1989*

Í Føroyum verðu tað øllum kunnugt nýttir seðlar og myntir at gjalda við. Hóast nógv tey flestu oftani nýta gjaldskort at gjalda við, so er tørvurin framvegis stórur á teimum góðu gomlu seðlunum og myntunum.

Fyri kortum fingu føroyingar ein nýggjan hálvtrýsskrónuseðil. Um eitt ár ella so kemur eisini ein nýggjur føroyskur hundraðkrónuseðil. Nýggju føroysku pengaseðlarnir verða gjørdir í sambandi við, at danir hava skift allar teirra seðlar út við nýggjar, og tá skulu eisini teir føroysku seðlarnir skiftast út.

Tað eru tó ikki einans seðlarnir, sum verða skiftir út. Eisini myntirnar verða skiftar út við jøvnum millumbili. Rættari hevði heldur verið at sagt, at tær verða broyttar av og á, tí skapi og evni eru tey somu sum áður.

Orsøkin til, at vit nú fáa nýggjar myntir skyldast, at nýggjar andlitsmyndir eru gjørdar av drótningini. Síðani tann núverandi røðin byrjaði í 1989, so er andlitsmyndin av drótningini broytt tvær ferðir. Orsøkin er tann, at roynt verður altíð at hava eina so hóskandi mynd av drótningini sum gjørligt.

Nýggju myntirnar vórðu givnar út í gjár (mikudagin). Tað er Mogens Møller, myndahøggari, sum hevur prýtt myntirnar við nýggjum andlitsmyndum av drótningini.

Gomlu myntirnar kunnu tó framvegis enn nýtast sum gjaldføri.



# Ferðin drepur

**Tá tað kann prógvast, at fólk, sum verða ákoyrd av bili við 50 km/t doyggja, skal ferðin lækkast so nógv, at hon ikki drepur. Hesa hugsjón royna tey í verki í Trollhättan í Svøríki**

FERÐSLUTRYGD
*Eirikur Lindenskov*




*Null-hugsjónarbreytin er eitt 40 km langt vegastrekki í bygdum og óbygdum øki, har stórur dentur er lagdur á ferðslutrygdina. Fólk koma úr øllum heimi til Trollhättan í Svøríki at royna breytina*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

Týsdagin sluppu teir umleið 85 føroyingarnir, sum vóru við ferðalagnum hjá Ferðslutrygd í Trollhättan í Svøríki, at royna nógv umrøddu Null-hugsjónarbreytina.

»Nollvisionsslingon«, sum sviar nevna hesa breytina, er eitt 40 km langt vegastrekki, har stórur dentur er lagdur á at gera vegin so ferðslutryggan, sum til ber.

Talan er um samstarv millum land og kommunu, millum svenska ráðið fyri ferðslutrygd, Saab-bilaverksmiðjuna o. o.

Aðalmálið við Null-hugsjónini er, at eingin skal doyggja ella verða álvarsliga skaddur í ferðsluni. Tí verður stórur dentur lagdur á at arbeiða fram móti hesum máli.

Sviarnir, ið greiddu okkum í ferðalagnum frá, søgdu, at tað sjálvsagt er trupult at náa hesum máli, men at tað eisini er sera umráðandi, at vit náa broytingum fram móti málinum.

Við hesi stevnu í huga, er null-hugsjónarbreytin gjørd. Henda breyt er vanligur koyrivegur, sum gongur bæði gjøgnum bygt og óbygt øki, gjøgnum fjølbygt og minni fjølbygt øki.

Við null-hugsjónini verður t. d. staðfest, at stórur skaði stendst av, tá bilur verður ákoyrdur frá síðuni við ferð hægri enn 50 km/t. Tí skal ikki koyrast meira enn 50 km/t gjøgnum krossvegir.

Eisini er staðfest, at fólk, sum verða ákoyrd av bili, sum koyrir 50 km/t ella meira í allar flestu førum doyggja, meðan fólk, ið verða ákoyrd av bili, sum koyrir 30 km/t fáa »smærri« skaðar.

Tí skal ikki koyrast meira enn 30 km/t har fólk og bilar ferðast á somu breyt.

Tað er eisini staðfest, at stórur skaði stendst, tá bilar renna frontalt saman, tí er gyrðing gjørd millum koyribreytirnar, so bilarnir ikki kunnu renna frontalt saman.

Alt hetta ger, at bilførarin má vera árvakin, tí á null-hugsjónarbreytini eru ferðaavmarkingar upp á 30, 50, 70 og 90 km/t. Fyri at hetta ikki skal verða nakar trupulleiki, hevur Saab-verksmiðjan gjørt eina skipan, bygd á GPS-fylgissveinaskipanina, sum ger, at bilurin »veit« hvør hægst loyvda ferðin er. Hetta merkir bilførarin við, at spitarin gerst trekur, tá ferðin ferð upp um hægst loyvda markið.

Nakrir royndarbilar hava fingið hesa skipan ísetta, og koma fólk nú úr heiminum øllum til Trollhättan í Svøríki at royna bilarnar á Null-hugsjónarbreytini.

Tað er langt síðani prógvað, at ferðin drepur. Tí skal tilpassast umhvørvinum, og umhvørvið tilpassast ferðsluni.



*Magnus Gunnarsson frá Sosialinum roynir serútgjørda Saab bilin á 0-hugsjónarbreytini í Trollhättan. Spitarin verður trekur, tá ferðin fer upp um mest loyvda markið*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

# Ferðslulógin skal gerast einfaldari

**– Ferðslulógin eigur at verða einføld og konsekvent, heldur Helena Dam á Neystabø, forkvinna í løgtingsins rættarnevnd, sum eisini heldur, at føroysku myndugleikarnir eiga at taka 0-hugsjónina til sín**

FERÐSLUTRYGD
*Eirikur Lindenskov*

– Eg ætli mær at kanna, um verandi lóggáva er nóg góð. Um hon er nóg einføld, og um hon er nóg løtt at umsita. Hetta sigur Helena Dam á Neystabø, sum er formaður í Løgtingsins rættarnevnd. Hon var annar tingmaðurin, sum var við á ferðini í Trollhättan týsdagn.

Hon heldur, at tað sjálvandi er endamálið at eingin skal doyggja í ferðsluni, og hon heldur, at 0-hugsjónin er eitt upplagt endamál hjá føroyskum myndugleikum at seta sær. Hon heldur, at vit eiga at finna einklar skipanir. Hon heldur t. d., at tað skal verða meira konsekvent, at tá fólk koyra ov skjótt, so eiga tey at missa koyrikortið heldur enn at fáa ein treytaðan dóm. Hon heldur eisini, at vit við rúsdrekkakoyringini eiga at verða meira konsekvent, eins og ætlanir eru um í Svøríki. Hon heldur, at promillumarkið eigur at verða 0,0.

– Vit eiga at velja, at um vit njóta rúsdrekka, so skulu vit lata bilin standa.

Helenu Dam á Neystabø dámdi eisini væl serligu skipanina í Saab bilunum, har spitarin gjørdist trekur, um ferðin fór upp um mest loyvda markið.

– Er hetta ein rímuliga bílig skipan, so eiga vit sjálvandi eisini at taka hasa skipanina til okkum – tí hetta er ein genial skipan, heldur hon.

Helena Dam á Neystabø lovar, at tey í rættarnevndini fara at hyggja væl eftir nýggju ferðslulógini, tá hon kemur til viðgerðar har.

– Serliga kundi eg hugsað mær, at vit fingu burtur aftur treytaða frádøming av koyrikortinum, so lógin aftur verður meira konsekvent, sigur Helena Dam á Neystabø.

## Nýggj ferðslulóg er á veg

**Í arbeiðinum við nýggju ferðslulógini hevur 0-hugsjónin ofta verið uppi og vent, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, sum á ferðini í Trollhättan hevur fingið nógv hugskot við sær heim**

FERÐSLUTRYGD
*Eirikur Lindenskov*

– Hetta hevur verið sera upplýsandi, og eg havi fingið nógv við mær heim, sum eg kann arbeiða víðari við. Hetta sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum – og harvið eisini ferðslumálum, sum var við í ferðalagnum hjá Ferðslutrygd í Trollhättan í Svøríki týsdagin.

Bjarni Djurholm heldur, at tað í sjálvum sær er eitt mál, at eingin skal doyggja ella verða álvarsliga skaddur í ferðsluni, og tá formaðurin í Ferðslutrygd, Petur Jacob Sigvardsen í gjár segði við Sosialin, at Føroyar eru einasta norðurlandið, sum ongan ferðslutrygdarpolitikk hava, so er landsstýrismaðurin ikki vísir í, at hetta er rætt.

– Í vinnumálastýrinum sita fólk í løtuni og arbeiða við eini nýggjari ferðslulóg. har hevur Null-hugsjónin ofta verið uppi og vent, og tey hava tikið nógv at tí við, sum okkara grannalond eru komin við, sigur Bjarni Djurholm.

Hann heldur, at tað politiskt einki er í vegin við at taka Null-hugsjónina til sín, men tá tað kemur til at játta pengar er øðrvísi, tí slíkar broytingar henda ikki frá degi til dags.

– Vit mugu eisini ansa eftir, at vit ikki seta okkum ov høg mál, sigur hann.

Landsstýrismaðurin sigur, at tað sjálvandi snýr seg um at broyta hugburð, og at tað eiga vit eisini at arbeiða fyri í Føroyum, og viðgongur hann, at vit á ferðslutrygdarøkinum eru afturúrsigld.

Ætlanin hjá Vinnumálastýrinum er, at nýggja ferðslulógin skal koma fyri tingið í hesi tingsetuni.

## Mælir til aðalorðaskifti um ferðslutrygdarpolitikk

**Henrik Old, tingmaður Javnaðarfloksins skjýtur upp, at tingið fer undir aðalorðaskifti um ferðslutrygdarpolitikk at fáa greiðu á, hvat politikarar vilja**

FERÐSLUTRYGD
*Eirikur Lindenskov*

– Eg haldi, at nøkur av hesum hugskotunum, vit hava fingið í dag, kunnu brúkast í smábygdunum í Føroyum, heldur Henrik Old, løgtingsmaður, sum eisini var við á ferðini í Trollhättan týsdagin.

Hann heldur tað verða lítið sømuligt, at Føroyar eru einasta norðurlandið, sum ikki hevur ein ferðslutrygdarpolitikk, og heldur, at tað er upplagt at vit eisini taka Null-hugsjónina til okkum.

– Sjálvandi kostar hatta nógvar pengar. Men vit mugu seta okkum eitt mál, tí gera vit ikki tað, so hendir einki, sigur hann.

Henrik Old sigur, at tey í Javnaðarflokkinum eru komin til tað niðurstøðu, at tað má verða landsstýrið, sum má koma við uppskoti um nýggja ferðslulóg. Hetta er eitt sera krevjandi arbeiði, sum ein andstøðuflokkur ikki er førur fyri at gera.

– Í tinginum kunnu vit sjálvandi luttaka í arbeiðinum, og tað fara vit eisini at gera, heldur Henrik Old, sum skjýtur upp, at løgtingið heldur eitt aðalorðaskifti um ferðslutrygdarpolitikk, so greiða fæst á, hvat føroyskir politikarar vilja á hesum øki. Hann leggur dent á, at eitt aðalorðaskifti ikki í sjálvum sær førir til broytingar, men tað kann seta nakað í gongd, vísir hann á.

Henrik Old sigur, at tað sjálvandi eru hugburðsbroytingar, sum skulu til. Ikki bara hjá myndugleikum, men í øllum samfelagnum. Hann heldur, at nógvar smærri ábøtur kundu verið gjørdar, sum høvdu verið í tráð við Null-hugsjónina, eitt nú at byrgja fyri, har vanlukkur henda fleiri ferðir.